# Ótrúligur sigur til Kimi Raikkonen

**Kanadiska formel 1 koyringin í Montreal, gjørdist bæði spennandi og dramatisk, og at endans næstan ótrúlig**

NIELS UNI DAM
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Við orðunum "There's something wrong with the car" koyrdi Alonso í pit á 38. umfarinum*

Mynd: Reuters

Tá Kimi Raikkonen lyfti steypið fyri at hava vunnið kanadisku formel 1 koyringina, tyktist tað heldur løgið. Kimi hevur verið tann óhepni í ár. Hann hevur koyrt ótrúliga væl, uttan at fáa tey uppibornu stigini. Men í dag var hann slettis ikki sannførandi, og bæði liðfelagin Montoya, og báðir Renault bilarnir koyrdu betur enn Kimi. Men nú vóru teir, teir óhepnu.

Jenson Button og Michael Schumacher skelkaðu leygardagin við at takað fyrstu byrjunarrøð. Men longu áðrenn fyrsta sving, vóru Renault bilarnir sum vant fremstir. Men fyri einaferð skuld var tað Giancarlo Fisichella, sum var fremstur og Fernando Alonso, sum var næstur. Bæði Michael Schumacher og Jenson Button høvdu ringa byrjan, og mistu fleiri pláss.

Fisichella helt fyrsta plássinum til 33 umferð, tá hann fekk girtrupuleikar og koyrdi í pit, har hann gavst. Alonso var nú fremstur, við Juan Pablo Montoya og Kimi Raikkonen beint í hølunum.

Á 38. umferð var tað liðugt fyri Renault. Við orðunum "There's something wrong with the car" koyrdi Alonso í pit, aftan á at hava rakt veggin. Høgra bakdekk var punkterað, og bilurin var ov illa skaddur til at halda fram.

Montoya var nú á odda, framman fyri liðfelagan Raikkonen, aftan fyri hann vóru Jenson Button og Michael Schumacher. Á 47. umferð rakti Jenson Button ein kantstein, so hart, at vinstra framdekk brotnaði av. Bilurin stóð so illa fyri, at trygdarbilurin varð koyrdur út á breytina. Allir bilarnir skundaðu sær í pit, meðan alt felti varð savnað. Við einans 23 umferðum eftir, blivu allar pitætlanir nullstillaðar, allir bilar fingu tað bensini, sum skuldi til at koyra á mál.

Bert oddabilurin Juan Pablo Montoya bleiv ikki róptur inn, tí liðið gjørdi eitt mistak. Hetta flutti beinleiðis Raikkonen framum liðfelagan, og Montoya varð í øðini, tá hann koyrdi út aftur úr pit, tíanverri var øðin so stór, at hann ikki sá reyða ljósið í pittinum. Trygdarbilurin var á veg framvið, og tí var neyðugt at bíða. Montoya koyrdi beint út, og bleiv av hesum diskvalifiseraður.

Nú lá Raikkonen fremstur og Michael Schumacher á øðrum plássi, Trulli varð á triðja plássi, og Rubens Barrichello, sum var byrjaður aftastur, var á fjórða plássi. Tá 63 umferðir vóru farnar læstu bremsurnar hjá Trulli, og hann noyddist at gevast. Nú var Raikkonen fremstur, og báðir Ferrari bilarnir vóru á næstu plássunum. Michael Schumacher royndi at fanga Raikkonen, sum hevði trupuleikar við róðrinum. Men orsaka av ferðslu, gjørdist hann ongantíð ordiliga næskur. Og koyringin endaði soleiðis.

### Úrslitið í Kanada

| Nr. | Koyrari | Bilslag | Tíð |
|---|---|---|---|
| 1 | Kimi Räikkönen | McLaren-Mercedes | vinnari |
| 2 | Michael Schumacher | Ferrari | + 1,1 sekund |
| 3 | Rubens Barrichello | Ferrari | + 40.4 sekund |
| 4 | Felipe Massa | Sauber-Petronas | + 55.1 sekund |
| 5 | Mark Webber | Williams-BMW | + 55.7 sekund |
| 6 | Ralf Schumacher | Toyota | + 1 umferð |
| 7 | David Coulthard | Red Bull Racing | + 1 umferð |
| 8 | Christian Klien | Red Bull Racing | + 1 umferð |
| 9 | Jacques Villeneuve | Sauber-Petronas | + 1 umferð |
| 10 | Tiago Monteiro | Jordan-Toyota | + 3 umferð |
| 11 | Christijan Albers | Minardi-Cosworth | + 3 umferð |
| 12 | Jarno Trulli | Toyota | + 8 umferð |
| 13 | Juan Pablo Montoya | McLaren-Mercedes | Diskvalifiseraður |
| 14 | Jenson Button | BAR- Honda | Óhapp |
| 15 | Nick Heidfeld | Williams-BMW | Brek |
| 16 | Takuma Sato | British American Racing Honda | Brek |
| 17 | Narain Karthikeyan | Jordan-Toyota | Brek |
| 18 | Fernando Alonso | Renault | Brek |
| 19 | Giancarlo Fisichella | Renault | Brek |
| 20 | Patrick Friesacher | Minardi-Cosworth | Brek |

# Marcin verður verandi

**Góði byrðurin seinastu vikurnar hevur økt optimismuna í Gøtu, og nú er eisini greitt, at pólendski málverjin verður verandi alt kappingarárið**

GÍ
*Jákup mørk*

Tað er einki at ivast í, at lagið á fótbóltslagið í Gøtu er kvinkað nakað væl uppeftir, nú liðið eftir tríggjar sigrar er klintrað nakað frá niðurflytingarstrikuni.

Ikki minst á leiðslusíðuni tykist gleðin um hetta vera stór, tí hóast tosað hevur verið um møguleika fyri venjaraskifti í úrtíð, so leggur formaðurin dent á, at tey alla tíðina hava havt trúnna uppá, at gongdin fór at venda.

- Tað var sjálvandi øgiliga strævið, tá tað gekk so illa, men eg haldi ikki, at vit í nevndini hava upplivað nakað beinleiðis trýst. Sjálvandi hava vit fylgt gongdini, men tað gert tú eisini, um tað gongur væl. Men fyrst og fremst, so hava vit trúð uppá, at gongdin fór at venda. Í fleiri av dystunum var spælið eisini á eini góðari leið, hóast úrslitið ikki var tað, so tað var bara ein spurningur um tíð. Og tíbetur hevur tað so gingið rætta vegin seinastu umførini.

Tosað hevur verið um, at GÍ er í ferð við at fremja eitt ættarliðsskifti, og at krøvini til úrslit tí hava verið sett niður í eina tíð, men sjálvur vil formaðurin ikki meira enn partvíst taka undir við hesum.

- Vit hava jú vita av hesum í eina tíð. Men hinvegin haldi eg ikki, at vit í allar ævir skulu skjóta okkum undir hetta. Fyrr ella seinni vilja vit eisini síggja úrslit, men fyrst og fremst, so ræður um at vísa tol, og tað hevur tíbetur víst seg at geva úrslit í hesum føri. Í øllum førum, sum støðan sær út nú, heldur hann.

### Málverjan verandi

Brandur upplýsir annars, at GÍ nú hevur gjørt endaliga leiguavtalu við VB/-Sumba um pólverska málverjan, Marcin Dawid.

- Vit hava jú verið sera óhepnir á málmanspostinum í ár. Hallur fór jú niður, og Meinhardt, sum skuldi loysa av, varð skaddur longu í venjingardysti. Vit fingu so Hall upp aftur í nakrar vikur, og so gjørdu vit eisini leiguavtalu um Marcin í nakrar vikur. Nú hevur tað so víst seg, at Meinhardt enn ikki er komin veruliga fyri seg, og tá Marcin samstundis hevur spælt væl, hava vit gjørt av at leingja avtaluna. Vit halda í øllumf ørum, at tað er betri, um vit hava tveir góðar málverjar, heldur enn ongan, sigur GÍ-formaðurin at enda.

KÍ-GÍ 1-2 (1-1):

# Kinkur komin í KÍ

**Eftir at nýggi venjarin tóktist hava vent gongdini, er KÍ aftur nú uppsteðgað. GÍ hevur hinvegin fingið veruliga ferð á**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað var GÍ, sum tók alt við sær aftur um Leirvíksfjørð, tá teir sunnudagin vitjaðu í Klaksvík.

Í mun til so nógvar aðrar ferðir, so mundi KÍ hesaferð vera greiður favorittur undan dystinum. Ikki minst, tí gøtumenn máttu vera týðandi spælarar fyriuttan.

Men hendan veruleikan løgdu gestirnir kortini ikki so nógv í. GÍ so vant, so arbeiddu menninir hart frá fyrsta bríksli, og tað var sera sjáldan, at KÍ megnaði at spæla seg fram til nakrar veruligar møguleikar.

Og tað eydnaðist eisini GÍ, at leggja seg á odda, tá toppskjúttin í føroyskum fótbólti enn einaferð vísti, at hann er mest sum lívshættisligur framman fyri mótstøðumálið. Hóast vinkulin var nakað spískur, so langaði Súni Olsen til, og knallhart smoygdi bólturin sær undir Kartin Joensen í KÍ-málinum.

KÍ royndi at trýsta, og tað eydnaðist teimum eisini at javna, tá Hjalgrím Elttør var fyrstur á returbólti frá Heðini á Lakjuni, men framvegis tóktist gøtumenn vera omaná. Ikki minst sárliga tóktust teir hava tann eyka partin av sjálvsálitið, sum ofta kann verða avgerandi.

Og stutt eftir steðgin fingu teir eisini løn fyri áhaldandi stríðið. Símun Louis Jacobsen stóð brádliga púra blankur í brotsteiginum, og hann takkaði fyri.

### Lagnudystur mikukvøldið

Við dystinum fekk KÍ staðfest, at eitt venjaraskifti í sær sjálvum ikki er nóg mikið, um ein tung ítróttarlig gongd skal vendast.

Fyrst og fremst, so eru og verða tað spælararnir á vøllinum, sum skulu draga tyngsta lessið, og tann parturin tykist í løtuni at halda hjá KÍ. Eftir at spæligleðin veruliga var um at koma aftur fyrstu dystirnar, sum Oddbjørn Joensen helt um stýrisvølin, tykist talan nú aftur at verða um fastlæst.

Sjálvandi er talan um langa kapping, og sjálvandi kann KÍ enn vinna seg nakað væl longur upp á talvuna. Men tað fer altso at krevja nakrar sigrar skjótt. Longu mikudagin verður talan um útidyst á Skála, og tann dysturin kann í nógvar mátar vísa seg sera avgerandi fyri, hvar KÍ skal medda, tað sum eftir er av árinum.

## FAKTA UM DYSTIN

**KÍ-GÍ 1-2 (1-1)**
0-1: Súni Olsen, 30.
1-1: Hjalgrím Elttør, 37.
1-2: Símun Louis Jacobsen, 52.
**Dómari:** Eiler Rasmussen
**KÍ:** Kartin Joensen - Kristoffur Jakobsen, Jan Andreasen, Niclas Niclasen, Leon Bjartalíð (Ari Samson, 76) -Hjalgrím Elttør, Høgni Madsen (Tórur Lervig, 68.), Atli Danielsen -Heðin á Lakjuni, Ove Nysted, Arnold Joensen.
**GÍ:** Marcin Dawid - Jónreid Dalheim, Robert Rzeczycki, Atli Gregersen, Bjarni Justinussen - Áslakur Petersen, Sam Jacobsen (Sámal Joensen, 90.), Magni Jarnskor (Kaj Ennigarð, 68.), Hanus Jacobsen -Súni Olsen, Símun Louis Jacobsen (Poul Arni Jacobsen, 78.)
**GK:** Niclas Niclasen, Ove Nysted -Magni Jarnskor, Súni Olsen.
**RK:** Jan Andreasen.